Bjarni Djurholm:

# Karsten vanvirðir umsiting mína



*Bjarni Djurholm leggur nú skjøl á borðið, har víst verður á, at søkt varð um pening til fýra mál sama dag, og at bert peningur til Norðoyatunnilin ikki varð játtaður*

**Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, leggur nú skrivlig prógv á borðið um, at Karsten Hansen sigur ósatt um tíðarfreistina sum orsøk til, at Norðoyatunnilin ikki hevur fingið pening játtaðan. - Umsiting mín er einki minni enn vanvird av Fíggjarmálaráðharranum, sigur Bjarni Djurholm**

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*

»Bjarni var ov seinur við umbøn síni, og tískil lúkaði hann ikki krøvini at fáa pening játtaðan«, vóru rámandi orðini í seinastu viku hjá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, í sambandi við eykajáttanina til Norðoyatunnilin, sum enn ikki fyriliggur.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur í aftursvari sent Sosialinum skjøl, sum kunnu benda á, at Karsten Hansen ber ósannindi í sambandi við, at umbønin um eykajáttan ikki uppfylti krøvini við tíðarfreistini.

### Norðoyatunnilin skildur frá øllum hinum

Fíggjarmálaráðharrin vísti í seinastu viku á, at av tí at umbønin kom ov seint og ikki var útreiðsluneutral, lúkaði hon ikki tey krøv, sum ásett vórðu um eykajáttan í rundskrivi í januar, men hesum vísir Bjarni Djurholm beinleiðis aftur, ikki við orðum, men við skjølum, hann í vikuskiftinum hevur sent Sosialinum.

Skjølini vísa, at í umbønini til eykajáttan fyri mars eru fýra mál. Hesi eru søla av Ternuni, avtøka av Vinnuframagrunninum, landsvegur í sambandi við Norðoyatunnilin og setan av kærunevnd í umsiting av barsilsskipanini.

Hesi fýra mál vórðu send Fíggjarmálaráðnum 24. februar í somu umbøn í sama skjali, og sambært Bjarna Djurholm fingu øll málini pening játtaðan, uttan Norðoyatunnilin. Tað, vinnumálaráðharrin við hesum vísir á, er, at talan ikki kann vera um nakra tíðarfreist, sum ikki er lúkað.

- Av eini ella aðrari orsøk, vit ikki kenna til, var tað bert Norðoyatunnilin, sum ikki fekk pening játtaðan. Øll hini málini í okkara umbøn fingu pening uttan vegagerðin í sambandi við Norðoyatunnilin, sigur Bjarni Djurholm.

Talan kann sostatt ikki verða um, at Vinnumálaráðið hevur verið ov seint við umbønini um eykajáttan til tunnilsvegin, tí biðið varð um eykajáttan til nevndu trý endamál í senn. Í prinsippinum er talan ikki um útreiðsluneutrala umbøn, men sæð burtur frá eykajáttanini til Vinnuframagrunnin, so varð talan stórt sæð talan um útreiðsluneutrala umbøn.

Bjarni vísir við hesum á, at um Vinnumálaráðið veruliga hevði verið ov seint við umbøn síni og harvið ikki lúkaði tíðarfreistina, høvdu hini málini í somu umbøn sjálvsagt heldur ikki fingið pening.

- Men tað fingu tey, og tískil er tað ein beinleiðis lygn frá Karsten Hansen, sum hevur sorterað Norðoyatunnilin burtur frá hinum málunum, sigur ein avgjørdur og bersøgin Bjarni Djurholm. Hann vísir víðari á, at stórt sæð var talan um útreiðsluneutralitet, við tað at gamla Ternan samstundis varð sett á sølulistan fyri 350.000 krónur, meðan umbønin til Norðoyatunnilin var á 400.000 krónur.

Umframt hetta sigur Bjarni Djurholm, at í sambandi við fyrispurningin til eykajáttanina var tætt samstarv millum Atla Eirikssson, fulltrúða í Vinnumálaráðnum, og Atla Leo, fulltrúða í fíggjarmálaráðnum.

### Rundskrivið umfataði ikki mars mánað

Karsten Hansen sipaði í seinastu viku eisini til áðurnevnda rundskriv, sum varð sent øllum stýrunum, har víst varð á treytirnar fyri eykajáttan. Men sambært Bjarna Djurholm umfataði hetta rundskriv bert august og oktober mánað, og ikki mars, tá umbøn Vinnumálaráðsins um m.a. pening til Norðoyatunnilin varð viðgjørd í Fíggjarmálaráðnum.

- Tískil hongur einki saman hjá Karsten Hansen, og tað tykist, sum hann bert heldur á við ákærandi lygnum móti mær og míni umsiting, slær Bjarni Djurholm fast.

### Umsitingin vanvird

Sambært Bjarna Djurholm kann hann ikki lata fara aftur við borðinum, at umsiting hansara verður niðurgjørd og ákærd fyri vánaligt arbeiðslag.

- Sum landssýrismaður ætli eg mær ikki at lata slíkar høpisleysar ákæringar standa ósvaraðar, tí hetta umfatar alt arbeiðsfólk okkara í umsitingini, eisini P/F Norðoyatunnilin og landsverkfrøðingin, sigur landsstýrismaðurin í Vinnumálum.

Sum aftursvar til skuldsetingar Karstens um, at umbønin til pening til Norðoyatunnilin kom ov seint, hevur Bjarni Djurholm á henda hátt skjalprógva, at í øllum førum varð umbønin um pening til fýra mál send sama dag, og at bert peningur til Norðoyatunnilin varð hildin aftur.



*Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, verður av Bjarna Djurholm ákærdur fyri at bera ósannindi viðvíkjandi eykajáttan til Norðoyartunnilin, og leggur Bjarni í dag skjøl á borðið sum prógv fyri hesum*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Andrea á Regni 85 ár



Í gjár, mánadagin 11. august, fylti Andrea á Regni á Toftum 85 ár. Føðingardagin helt hon seinnapartin sunnudagin á Eysturoyar Røktarheimi, har hon hevur verið tey seinastu árini. Eftir eitt strik lammaðist hon, og tað ber illa til at siga nakað, men Andrea er púra klár, hon fylgir væl við, og sjálvandi kendi hon tey, sum sunnudagin vóru inni á gólvinum og heilsaðu uppá.

Andrea giftist 9. juni í 1940 við Johan Olsen ella Hanni uppi á Regni, sum hann varð nevndur á Toftum. Tey fingu sær seinni á Regni sum eftirnavn. Hanni, sum var óførur útróðrarmaður, var eisini á Røktarheiminum í nøkur ár, áðrenn hann doyði 26. oktober í 1997. Tá var hann 81 ára gamal.

Andrea muni hava nóg mikið at takast við heima við hús. Hon og Hanni fingu tíggju børn: Elisabeth, Páll, Dina, Guttorm, Herborg, Árna, Jonhard, Elsa Maria, Jóna og Jógvan Martin. Elisabeth býr í Runavík, Páll í Saltnesi, Dina í Fuglafirði, Guttorm í Gøtu, Herborg og Jóna í Havn, Árna býr niðri, Elsa Maria í Noregi, og Jonhard og Jógvan Martin búgva á Toftum.

Foreldrini hjá Hanna vóru Elisabeth og Guttorm Olsen. Hon var ættað úr Túni á Toftum og doyði longu í 1929, meðan Guttorm livdi til 30. januar í 1961. Hann varð 81 ára gamal og búði alla tíðina inni hjá Andreu og Hanna, sum hevði yvirtikið barnaheimið.

Tað hevur altíð verið nógv samband millum Svínoy og Toftir. Upp ígjøgnum tíðirnar hava ikki so fáar giftir verið millum hesi bæði plássini, og ein av hesum var so tann millum Andreu og Hanna á Regni. Andrea er ættað uttan av Bø í Svínoy, og hon plagdi ofta saman við sínum at vitja aftur um sumrarnar. Foreldrini hjá Andreu vóru Dina og Poul Sivert Hansen. Tey fingu átta børn: Hanus, Óli, Hans Dávid, Esmar, Elsebeth Malena, Andrea, Behrendt, ið doyði sum smádrongur, og Bertha.

Eftir á lívi eru Elsebeth Malena, sum giftist til Vágs, Andrea og Bertha, sum í nógv ár búði í Svínoy, og sum nú í fleiri ár hevur búð í Hvannasundi. Hanus búði fyrsi í Svínoy og síðani í Havnini, har Esmar var heilsølumaður, Óli var lærari í Søldarfirði, og Hans Dávid búði í Svínoy.

### Finn Rubeksen 25 ára starvsdag



Hósdagin 7. august hevði Finn Rubeksen í Havn 25 ára starvsdag hjá Ivan Johansen Bilum.

Finn byrjaði sum bilmekanikaralærlingur hjá Ivan Johansen á Láarvegnum í 1978. Síðan tá hevur hann starvast í fyritøkuni sum bilmekanikari. Hann hevur víðkað sína útbúgving og er í dag serviceteknikari við Citroën sum sergrein, hendan útbúgving verður leypandi dagførd við skeiðum hjá Citroën í Danmark. Í juni 2003 tók hann eisini motorpassaraútbúgving.

Finn er sonur Jónu og Bent Rubeksen á Hálsatjørn í Havn. Hann er giftur við Mariu, f. Petersen, úr Havn, og eiga tey tveir synir.

### Sigrun Skálagarð 40 ár



Í gjár, mánadagin 11. august, fylti Sigrun Skálagarð í Klaksvík 40 ár. Hon er leiðari á HF skúlanum í Klaksvík og er tískil væl kend millum nógv av yngra fólkinum í Norðoyggjum.

Sigrun er ættað úr Klaksvík. Foreldrini eru bæði av Kirkju. Bethuel er av Deild, og Solborg úr úti í Húsinum, sum tað verður nevnt. Bethuel og Solborg búðu tey fyrstu árini á Kirkju, og í 1967 fluttu tey til Klaksvíkar.

Sigrun er yngst av fýra systkjum. Hon er gift við Hans Ólavi Skálagarð í Klaksvík, og tey eiga tvær gentur – Ingun og Aleksandra.

Sigrun tók HF prógv í Klaksvík í 1983. Í 1992 leyk hon prógv á lærda háskúlanum í Århus. Høvuðslærugreinin er atronomi ella stjórnufrøði. Føroyingarnir, sum hava astronomi sum høvuðsgrein eru ikki nógvir. Hjálærugreinirnar eru støddfrøði og alisfrøði.

Síðani 1992 hevur Sigrun starvast í HF skúlanum í Klaksvík og studentaskúlanum á Kambsdali. Tíðliga í 1995 gjørdist hon leiðari á Klaksvíkar HF skeiði, og hon er framvegis í tí starvinum. Boð hava ofta verið eftir Sigrun at undirvísa á tekniska skúlanum í Klaksvík.

Millum næmingarnir ber Sigrun orð fyri at vera góður lærari. Hon gevur nógv, og hon roknar við, at næmingarnir eisini gera nógv við skúlatingini. Hon dugir sera væl at vera vinur við næmingarnar og samstundis at krevja nógv av teimum. Tað er ikki minst Sigrun fyri at takka, at umhvørvið á HF skúlanum í Klaksvík sigst vera sera gott.

Sigrun er limur í nevndini fyri Norðoya Sparikassa. Hon er útnevnd av ídnaðarmálaráðnum til tann nevndarsessin.

Í frítíðini fæst Sigrun nógv við at binda. Troyggjurnar, sum hon hevur bundið, eru nógvar, og hon hevur vunnið onkra kapping í at gera bindingarmynstur til troyggjur.

## Fimtan fingu studentsprógv í 1953

**Í tíðindablaðnum »Føroya Sosial-Demokratur«, leygardagin 27. juni 1953, standa tey sum fingu realprógv, millumskúlaprógv og studentsprógv fyri 50 árum síðan. Eisini er ein grein um próvtøkurnar, har m.a. verður skrivað um vánaligu umstøðurnar vóru hjá ungdóminum at fáa útbúgving**

PRÓVTØKUR
*Magnus Gunnarsson*

Navnframir skúlamenn eru farnir at tala meira og meira ímóti núgaldandi próvtøkuskipan, serliga millum børn, ið vilja royna hægri skúlaskap. Tílíkar upptøkuroyndir, ið nú fara fram, geva ivaleyst onga sanna mynd av kunnleika barnanna, og úrslitið verður tí, at hesar royndirnar veruliga kunnu koma at forða evnagóðum børnum at troyta landsins lærdómskeldur og nema tann vísdóm, ið kann koma at verða av so avgerðandi týdningi fyri alt lívið. Ivaleyst verður tað tí ikki leingi, til vit fáa eina tíðarhóskandi og meira rættvísa próvtøkuskipan.

Nú ein fjøld av ungdómi fer heim við prófseðlinum í hondini er eisini vert at minnast tann dapra veruleika, at kring um landið sita hundraðir av børnum, ið als eingi líkindi hava at ogna sær nakran kunnleika. Faðirin er kanska ein vánaliga stillaður fiskimaður ella arbeiðari, ið als ikki hevur ráð at senda børn síni til skúlarnar í stórbygdunum. Her er hópur av børnum við góðum evnum. Tað, at hesi evnini ikki koma til sín rætt og eingi líkindi hava at mýkjast og mennast, er ein drápuligur missur fyri viðkomandi ungfólk sjálvi, men tað ið verri er, er, at samfelagið meira enn nakar annar missur í stórum. Hetta er harði lutur teirra, ið ikki eru fødd við pengamappuni í hondini og tíverri vil hetta samfelagsórættvísi ikki verða av vegnum, so leingi vit liva undir einari samfelagsskipan við framíhjárættindum fyri teimum múgvandi og als ongum rætti fyri teimum, ið bera dagsins byrðar og hava tað møðisliga starvið, at tæna sum skrástívarar undir glæstristilveru teirra múgvandi.

Øll tey, ið nú kunnu gleða seg yvir endaða próvtøku, eiga tí at leggja upp í hin heilaga bardagan og ikki helma í fyrr enn hitt fagra málið er vunnið: Somu líkindi og sami rættur fyri øll landsins børn at troyta landsins lærdómskeldur.

**Realprógvini**
Oda Diana Arge
Trygvi Finnbjørn Askham
Poula Bærentsen
Virgar Tórarson Dalsgaard
Elly Maria Davida Dam
Christian Sigmundur Djurhuus
Rosa Irena Djurhuus
Marjun Isholm
Helena Restorff Jacobsen
Knud Lützen
Sólrun Mohr
Dann Mortensen
Arnold Karbech Mouritsen
Carl Oliver Næss
Bjarni Olsen
Anna Poulsen
Petur Poulsen
Heðin Samuelsen
Asbjørn Simonsen
Katrin Thorkildshøj
Carl Wilhelm Weihe
Myrna Aabæk

**Millumskúlaprógvini**
Thomas Arge
Richard Bjarki Johan Bugatsch
Gunnvør Hammersheimb Christiansen
Eivind Vøgg Guttesen
Ella Hjalt
Eðin Wenningsted Jacobsen
Flóvin Jacobsen
Elbert Joensen
Eyðna Kristina Joensen
Kamma Reinert Joensen
Magda Joensen
Eyðun Johannesen
Sólbrún Kjeld
Eyðum Conradsson Joensen
Sólrun Bergljót Ludvig
Jørgen Winther Lützen
Jórun Matras
Heðin Sigfríður Eliassonur Nielsen
Óttar Nielsen
Beinta Samuelsen
Gorm Lindenskov Simonsen
Agnas Sundstein
Jákup Weihe
Ole Wang
Heðin Wardum
Annfinnur Zachariasen

**Studentsprógvini**
15 studentar tóku prógv í 1953

**Nýmálsligir:**
Hilma Viðstein, Tórshavn
Kirstin Bech, Tórshavn
Sigrun Danielsen Stykkið
Johanna Davidsen, Skála
Johanna Mortensen, Tvøroyri
Augusta Nielsen, Tórshavn

**Matematiskir:**
Benadikt Davidsen, Sandur
Óla Jákup Hansen, Sørvágur
Marita Arge Magnussen, Tórshavn
Anfinnur Mikkelsen, Leirvík
Poul Olsen, Eiði
Petur Sigurd Rasmussen, Tórshavn
Jørmund Reinert, Norðradalur
Marius Thomassen, Tórshavn
Marjun Weihe, Tórshavn

### Dagurin

**12. august. Klara**, deyð í 1253, var av aðalsætt úr Assisi. Fór upp í fylgið hjá hinum heilaga Fransi, og eggjað av honum grundlegði hon eitt nunnukleystur og skipaði eina nunnuskipan, *klarissurnar* nevndar.

Navnið er latínskt, og merkir *hin kenda* ella *skæra*.